## Bílegg tíð

Til ber at bíleggja tíð á telduposti boyli@boyli.fo ella á telefon 660700.

## Opið

Sí boyli.fo

Boyli

Klaksvíksvegur 85
700 Klaksvík

Tel 660700
boyli@boyli.fo

# Fastir boylar

Boyli

# Hvat er ein fastur boyli

Fastur boyli er sum togbanar, sum kunnu flyta tenn. Tað tekur oftast umleið tvey ár at ganga við føstum boyla. Tá ið fasti boylin verður tikin av, seta vit oftast ein haldi boyla innanfyri á framtenninar í yvir- og undirmunninum.

Matur hangur lætt fastur í boylanum, tí mugu tenninar bustast sera væl. Um boylin og tenn ikki vera bustaðar sera væl, so koma varandi skaðar á tenninar. Skaðarnir eru ljósir plettir ella misfarvingar á tenninar og í ringasta føri, so er hol undir misfarvingunum.

## Busta tenn

Tað er millum boylan og tenninar, at tað er trupult at busta og har mat restirnar sita. Tí skal tað bustast serliga væl.

Bustin skal koppast so at pinnarnir á bustini sleppa upp millum bogan og tenninar. Busta við smáum skrubbandi rørslum, so bustin sleppur allar staðir.

## Fyrsta tíðin

Fyrstu dagarnir eftir at boylin er settur á ella verður spentur eru tenninar eymar. Eymleikin minkar næstu dagarnar og 3-4 dagar seinni hevur tú vant teg við hvussu tenninar kennast. Et mat, sum er egnaður til boylan. Sker í bitar so at boylin ikki brotnar av harðum ella stórum bitum. Her hugsa vit um stórar ráar gulrøtur, bingo kúrlir og hart tyggjugummi.

Kjálki og varrar kunnu fáa merkir av boylanum. Vanliga hjálpir við at leggja voks á boylan.

Krókarnir og aftastu rørini hava lyndi at stinga meir enn sjálvi lásini. Til tey er betri at koyra vat rundan um.

Tak pínustillandi eftir tørvi. Vanliga er tað bara neyðugt fyrstu dagarnir.

Stingur tú teg av boylanum, so mást tú ringja og avtala tíð.

Boylin er límaður á tenninar og situr fastur, men boylin skal takast av aftur. Tí er límí bara ætla at halda nokk so fast. Etur tú stórar ella harðar bitar, so brotnar boylin lætt.

## Eftirlit

Tú kemur til kontrol av boylanum 6-10 hvørja viku. Brotnar boylin er tað umráðandi, at tú gevur okkum boð um tað. Tað er ikki tíð til at líma brotna boylan til vanliga kontrol.

Tað er loyvi at brúka bleytt tyggjugummi saman við fasta boylanum.

